LM-099/2023

Flygiskjal 93

## Onki um okkum - uttanum okkum!

Við hesum felags hoyringssvari frá øllum festarum og óðalsbøndrum umboðandi allar hagapartarnar í Vestmanna bygd, vilja vit staðiliga heita á landstýrismannin í uttanríkis og vinnumálum um at taka hesar, okkara viðmerkingar til eftirtektar.

Vit hava síðan araldstíð skipa okkara hagarakstur eftir teimum til eina hvørja tíð galdandi lógum. Galdandi lógir á økinum eru m.a. *Ll nr. 171 av 18. Maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við logtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020* og *Lov nr. 172 av 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m., sum seinast broytt við logtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.*

Hesar lógir, og samsvarandi eldri lógir hava til altíð verið bulurin undir skynsomum hagarakstri. Ikki minst tá tað snýr seg um lóg og rætt grannanna millum. Tí lógirnar hava avmarkað okkara ræðisrætt, til at galda innanfyri egið hagamark.

Gamaní hava ósemjur stungið seg upp millum grannar, men lógirnar, hava verið júst tað sum hevur gjørt, at vit hava kunna skipa okkara hagar og harvið land, so væl sum vit hava. Bæði tá talan er um landbúnað, gróður, náttúru og villini fugl í høgunum.

Júst tær føroysku landbúnaðarlógirnar, eru ivaleyst eins gamlar og føroyska landnámið, og harvið kanska einasta veruliga føroyska lóggáva vit hava. Tað í sær sjálvum er ikki so lítið, tá hugsa verður um, at vit ikki eru eitt sjálvstøðugt land.

Við lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu, vita vit, sum eiga ella hava jørð í festi, als ikki hvussu vit framyvir skulu skipa okkara hagar og rakstur av jørðini, tí uppskotið strikar grundarlagið undir okkara virksemi, uttan at seta nakra aðra skilagóða loysn ístaðin fyri tær strikaðu lógargreinarnar.

Í m.a. § 17. í lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu, har lagt verður upp til at strika § 41. og § 42. í *Ll nr. 171 av 18. Maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við logtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020* og *Lov nr. 172 av 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m., sum seinast broytt við logtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.* Verða vit, eigarar og festarar í veruleikanum frátiknir okkara ræðis,- og brúksrætt á okkara egnu ognum. Ein rættur sum vit altíð hava umsiti við ábyrgd eftir galdandi lógum á økinum.

Lóggávan um *hegn og markfred* er einasta trygd fyri burðardyggum seyðabrúki og skynsamari náttúruvernd. Har vit sum eigarar gagnnýta okkara tilfeingi skynsamt og burðardygt.

Tað er ørkymlandi, tá so greiðar lógir sum vit hava á økinum, verða strikaðar í eini nýggjari lóggávu um burðardygga ferðavinnu. Lógirnar hava altíð verið. Ferðavinnan er nýggj og henni nýtist einans at kunna seg um galdandi lógir, fyri at kunna virka.

Ein almannarættur, sum skotið verður upp í § 3. í lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu, kemur at forkoma allari skilagóðari røkt av haga og seyði, samstundis sum hann frátekur okkum

okkara ognarrætt sum bøndur, eins og omanfyri nevnt, kemur almannarætturin at beina fyri seyðahaldinum í Føroyum.

Sjálvt § 5. í lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu, har hundur einans er loyvdur í haga ísmb. við landbúnaðarvirksemi, er óbrúkiligur tá ið § 41 og 42, eru strikaðir, tí tá er ongin forðing fyri, at fara langt inn til grannar og enntá tvørtur um hagar at beita seyð. Hetta leggur upp til lógloysi.

Okkara meining er, um lógir skulu broytast sum ávirka okkara brúksøki, er ikki meir enn rímiligt at fyrst og fremst vit, verða tiknir uppá ráð. Síðani, kann man tillaga tær lógir sum hoyra landbúnaðinum til, um neyðugt.

Vit kunnu als ikki góðtaka at ein hissini ferðavinnulóg, skal skúgva okkara aldargomlu jarðarlógir til viks.

Í lógaruppskotinum til burðardygga ferðavinnu, er annars ikki ein einasta grein, sum ikki eyðmýkir okkum og okkara sjálvsfatan sum óðalsbøndur og festibøndur, vit sum við virðing fyri okkara forfedrum og komandi ættarliðum umsita jørðina burðardygt.

-

Vit eru byrjaðir at geva inni í Heygadali og í Fonsdali. Uppi á Hálsi og úti í Dal. Tær flestu av teimum treiskastu ónum hava vit fingið at liggja við vetrarstøðurnar. teimum hava vit leita eftir í kavanum sum ligið hevur um árskiftið og vit hava leitt tær á lægri haga, gjøgnum fannir og illgongd lendi. Gjøgnum støð í haganum, sum einans vit, sum røkja hagarnar kenna.

Vit kenna støðini við teirra røttu nøvnum, tí tað er lagt í okkum av eldri seyðamonnum. Vit kenna hagarnar tí vit virka í teimum, og vit kenna seyð okkara og hann kennir okkum. Vit kenna best okkara lendið og hvussu vit skulu røkta okkara seyð í mun til veður og árstíð.

Alt okkara uppland er ávirkað av okkara seyði og røktini av honum, og tað er tað landið sum ferðafólkið vil síggja.

Rásirnar og gróðurin eru blivnar til av seyðabrúkinum. Kráðir og torvhústoftir, og farvegir av gomlum virksemið í høgunum ber alt boð um, at hetta var og er kjarnin undir bygdini. Eitt mentunarlandslag skapa av landbúnaði.

Tað er hetta landslagið sum gesturin vil síggja.

Tí vilja vit staðiliga biðja teg umhugsa, hvørjar avleiðingar lógaruppskotið kemur at hava fyri upplivingarvirði í høgunum.

Tí missa vit hagarnar og seyðin, so missa *tit* landslagið sum ferðavinnan selur útlendinginum og tá hava *tit* flett gásina sum legði gulleggini.

Við allari virðing fyri okkara lóggevandi valdi, vilja vit tí heita á tykkum um at taka lógaruppskotið aftur, og seti tykkum saman við okkara feløgum *Bóndafelag Foroya* og *Foroya Óðalsfelag*, umframt aðrar bólkar í okkara samfelagið og finni eina betri loysn uppá ferðavinnuna. Eina loysn sum ikki ger seg inná landbúnaðin og bøndurnar í Føroyum.

LM-099/2023

Við virðing

Hjalgrím á Heygum, óðalsbóndi

Jens Ivan í Gerðinum, festibóndi

Niels Th. Pedersen, óðalsbóndi

Vegna

Hagapartarnir í Vestmanna bygd:

Fjalli, Nesið, Heygahagarnar, Dalahagarnar og Bjargahagarnar.